J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 29. november 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# F U N D A R F R Á S Ø G N

## frá býráðsfundi nr. 15/2006

Ár 2006 tann 29. november kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. november 2006 um innkalling til fundar. Fundurin er sambært fráboðanini fluttur frá 30. november til 29. november og kunngjørdur samsvarandi.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen

***Skrivari:*** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Við á fundinum varð eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 59 og 60 vórðu viðgjørd.

**Mál nr. 59/2006.**

**Viðvíkjandi føroyskum eftirskúla.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá nevndini fyri føroyskum eftirskúla v/Ólavi Rasmussen, 850 Hvalba, hvar greitt verður frá, at nevndin við heimild frá Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag hava gjørt fyrireikingararbeiði um føroyskan eftirskúla.

Nevndin handaði landsstýrismanninum í mentamálum álit í málinum tann 28. september 2006, somuleiðis sum tíðindafundur var umborð á M/F Smyrli tann 10. september 2006, har álitið varð handað formonnunum fyri Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag.

Eftirskúlin, sum eftir ætlan verður bygdur í Hvalba, kostar umleið kr. 90,0 mió., við helvtarbýti millum land og kommunur. Skúlin við kostskúla kemur at rúma 80 næmingum, og hevur nevndin sett sær fyri, at skúlin er klárur at taka í nýtslu til skúlaárið 2009.

Nevndin loyvir sær sambært skrivinum á allar kommunur um at taka støðu til fíggjarliga partin av eftirskúlanum, sum umfatar árið 2007. Talan verður um tilsamans sama part sum tann hjá landinum kr. 7,5 mió. býtt millum kommunurnar proportionellt eftir fólkatalinum pr. 1. oktober 2005.

Fyri okkara kommunu er talan um áleið kr. 245.000,00 fyri 2007 og kr. 1.223.000,00 fyri 2008 og 2009 ella tilsamans kr. 1.468.000,00.

Sambært frágreiðingini um "Atlantic Adventure Eftirskúlan" koma kommunurnar og foreldrini at rinda 30% av rakstrarkostnaðinum, sum fyribils er mettur til kr. 125.000,00 pr. næming árliga og landið sambært § 17 í LL nr. 83 frá 17. mei 2000 70%.

Árligi rakstrarkostnaðurin av skúlanum tilsamans verður mettur til kr. 10,0 mió., so kommununar og foreldranna partur verður um kr. 3,0 mió.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. november 2006 og mælir einmælt fíggjarnevndini/býráðnum frá at luttaka í byggingini av eftirskúlanum í Hvalba, grundað á at kommunan í komandi árum stendur fyri stórum um-, út- og nýbyggingum av skúlum í kommununi.

Fíggjarnevndin hevur somuleiðis viðgjørt málið á fundi tann 23. november 2006 og mælir einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um ikki at luttaka í byggingini. Upplýsast skal, at eingin peningur er avsettur á uppskotinum til fíggjarætlan kommununar fyri 2007 á konto 445100 "Eftirskúli í Hvalba".

**Avgerð:**

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt, (9-0).

**<u>Mál nr. 60/2006.</u>**

**Mál viðv. 2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2007.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 28. september 2006 havt 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan kommununar til viðgerðar. Samtykt varð at beina uppskotið aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri at leggja uppskot til 2. viðgerð fyri býráðsfundin 30. november 2006.

Áðrenn uppskotið verður viðgjørt av fíggjarnevndini skuldu føstu nevndir kommununar hava viðgjørt sín part av ætlanini og gjørt sínar tilagingar/broytingar bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum. Fundir hava verið í øllum teimum føstu nevndunum, og eru hesar komnar við sínum fíggjarynskjum bæði tá talan er um rakstur og íløgur.

Býráðið hevur viðgjørt fíggjarynskir fyri 2007 á fundi tann 13. november 2006, har tosað varð um serliga íløgurnar fyri 2007, og í hesum sambandi verður víst til hjáløgdu fundarfrásøgn, har serliga íløgurnar í Fuglafjarðar havn og skúlan vórðu umrøddar.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Uppskotið við 1. viðgerð er viðgjørt á býráðsfundi tann 28. september 2006, men hevur tó ikki verið neyðugt hjá kommununi at kunnað Innlendismálaráðið um uppskotið, tá kommunan hevur minni enn 1 skattaálíkning í nettoskuld.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundum 18., 19, 23. og 31. oktober og 02., 03., 08. og 09. og 23. november 2006 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið við 1. viðgerð 28. september h.á., javnvigar við kr. 76.174.376,00, og verður tá roknað við einum avlopi upp á kr. 107.803,00.

Rakstrarútreiðslurnar netto til kr. 26.955.198,00, rentuútreiðslurnar netto til kr. 1.507.975,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 5.874.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 26.155.000,00 og netto til kr. 25.055.000,00.

Avseting til bygging av Røktarheimi, sum sambært býráðssamtykt frá 26. november 2002, broytt tann 25. november 2004 eigur at verða kr. 2.100.000,00, er lækkað niður í kr. 0,00 í 2006 og 0,00 í 2007. Eftir avseting, sum gjørd er fyri árini 2003, 2004 og 2005 eigur kommunan kr. 8,0 mió. á bók pr. 31. desember 2006 til nevndu bygging. Av tí at spurningurin um 50% studning frá tí almenna er ógreiður bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum, hetta sambært lóg um bygging av ellis- og røktarheimum, so eigur hetta mál at verða tikið upp aftur við landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum skjótast.

Annars er staðfest í 2006, at kommunan onga stuðulsjáttan fær frá landsstýrismanninum í almannamálum til røktarheimsbygging í hesum umfari, so ein Røktarheimsbygging møguliga verður seinkað 3-4 ár í mun til ta ætlan, sum býráðið samtykti 26. november 2002.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 39.429.976,00 við skattaprosenti 21,5%, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 6.000.000,00. Avseting til bygging av Røktarheimi av innistandandi verður somuleiðis strikað.

Roknað verður við eini lántøku upp á kr. 9,0 mió. til havnagerð og kr. 1,0 mió. til útbyggingar av Fuglafjarðar skúla, somuleiðis sum nýtslan av innistandandi verður kr. 4.070.000,00, har verða fluttar frá 2006 til 2007. Talan er um íløgu í sitipláss við fótbóltsvøllin kr. 770.000,00, kr. 2.500.000,00 til havnagerð oljubryggja og kr. 800.000,00 til íløgu í Vesturstovu (terassa eystureftir, vegur niðanfyri sólorkuskipan). Talan er í hesum føri um kr. 600.000,00 til terassu vm. og kr. 200.000,00 til sólprkuskipanina.

Í sambandi við íløguna í Vesturstovu verður neyðugt at broyta samtykt býráðsins um útsetan av avseting til játtan til byggjan av Røktar- og ellisheimi, somuleiðis sum neyðugt verður at broyta samtyktina, so ein játtan av hesi avseting kann verða flutt til aðra íløgu 520273 ”Terassa eystureftir, vegur niðanfyri og sóloruskipan tilsamans við kr,. 800.000,00.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 23. november 2006 at leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2007, sum javnvigar við kr. 76.174.376,00 fyri býráðið til 2. viðgerð og endaligu viðgerð, og mælir nevndin einmælt býráðnum til taka undir við uppskotinum, sum verða galdandi fíggjarætlanin fyri kommununa fyri 2007 við gildiskomu tann 1. januar 2007.

Somuleiðis mælir nevndin býráðnum til at broyta samtyktina um avseting til byggjan av Røktar- og ellisheimi soleiðis, at eingin peningur verður avsettur í 2007, eins og gjørt varð í 2006, og at kr. 800.000,00 verða nýttar av innistandandi, sum avsettar eru til hesa bygging til fíggjan av íløgum í eldrasambýlið Vesturstovu.

**Avgerð:**

Tilmælini frá fíggjarnevndini vórðu samtykt. (8 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 61/2006.</u>**

**Viðvíkjandi eykajáttan til økið í smábátahavnini konto 222049 og planering við Ísvirkið konto 222083.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 21. november 2006, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan í sambandi við at dýpa innsiglingina í bátahavnini konto 222049 og til planering uttan fyri Ísvirkið konto 222083, grundað á at arbeiðini mugu verða gjørd inniverandi fíggjarár.

Avsettar eru kr. 400.000,00 til hesi arbeiði og verður roknað við at nýta kr. 300.000,00 aftrat í ár.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 860006 "Partafelagsskattur". Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 varð partafelagsskatturin mettur til kr. 1,7 mió, men sambært uppgerð frá Toll- og skatt fyri inntøkuárið 2005 vísir seg, at hesin er kr. 3,5 mió. Soleiðis er tøkur peningur á hesi konto til endamálið.

Talan er í hesum føri um at veita eina eykajáttan upp á kr. 300.000,00 til íløgur á øki 2 "Kommunal virkir", og at fíggja hesa av meirinntøku av partafelagsskatti, sum verður goldin kommununi seinast í hesum ári og fyrst í komandi.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2006 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 300.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av meirinntøku av partafelagsskatti konto 860006.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 14. desember 2006. (9-0).

**<u>Mál nr. 62/2006.</u>**

**Viðvíkjandi eykajáttan til liðuggerð av dagstovninum og økinum uttanum konto 502305.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 21. november 2006, hvar greitt verður frá, at neyðugt at veita eina eykajáttan í sambandi við at gera kjallaran á dagstovninum og uttanumøkið liðugt, og at neyðugt er at heitab á býráðið um eina eykajáttan til endamálið.

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 eru avsettar kr. 1,170 mió til arbeiðið, men roknað verður við at nýta kr. 1,140 mió aftrat til liðuggerð av at innrætta kjallaran, til uttanumøkið og til keyp av innbúgvi, leikum vm.

Grundin fyri, at arbeiðið er vorðið so nógv dýrari enn roknað varð við, kemur í høvuðsheitunum av, at uttanumøkið varð nógv meira umfatandi enn upprunaliga ætlað.

Í 2005 vórðu avsettar kr. 500.000,00 til at innrætta kjallaran, so pláss vórðu fyri 16 børnum aftrat á dagstovninum, men arbeiðið fór veruliga ikki í gongd fyrr enn í 2006, soleiðis at nýttar vórðu umleið kr. 160.000,00 til arbeiðið í 2005. Munurin kr. 340.000,00 er tí at rokna sum ein framflyting frá 2005 til 2006.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 860006 "Partafelagsskattur". Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2006 varð partafelagsskatturin mettur til kr. 1,7 mió, men sambært uppgerð frá Toll- og skatt fyri inntøkuárið 2005 vísir seg, at hesin er kr. 3,5 mió. Soleiðis er tøkur peningur á hesi konto til endamálið.

Talan er í hesum føri um at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,140 mió til íløgur á øki 5 "Almanna- og heilsumál", og at fíggja hesa av meirinntøku av partafelagsskatti, sum verður goldin kommununi seinast í hesum ári og fyrst í komandi.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2006 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,140 mió til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av meirinntøku av partafelagsskatti konto 860006.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 14. desember 2006. (9-0).

## Mál nr. 63/2006.

**Umsókn frá Jústinus L. Eidesgaard, Hellurnar um byggiloyvi til uppíbygging á Hellunum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið Umsókn frá Jústinus L. Eidesgaard, 695 Hellurnar, dagfest 17. september 2006 um uppíbygging á matr. nr. 935 á Hellunum.

Verandi bygningur er umleið 51 m2
Ætlaða uppíbygging er umleið 22 m2
Um bygt verður samb. fyriliggjandi ætlan verður og nettoýtingarstigið . 0.26.
Mest loyvda er 0.5 tá bygt verður afturat á verandi grundstykkjum sum eru minni enn 300 m2.
Samb. ásetingarnar í byggisamtyktini, skulu sethús verða í minsta lagi 2.5 m úr mark.
Her er talan um at byggja sethús 5 m framvið í mark móti matr nr. 941 samb alternativ 1.
Og samb alternativ 2 verða 3,5 m 0,5 m og 1,5 m frá matr. nr. 941..

Verandi bygningar á matr nr. 941 og 935 er samanbygdir við betongveggi ímillum. Hesin stendur í mark.

Tá tað í hesum føri verður bygt nærri granna enn 2.5 m sum ásett í byggisamtyktini, er hetta byggimál viðgjørt sum frávik til byggisamtyktina. Og sent til grannahoyring hjá Jens Jacob Jensen, Skála Sum í skrivi dagf. 23. nov. 2006 boðar frá, at hann ikki góðtekur ætlaðu bygging, og metir at hendan vil minka um virði av ognini og kemur at taka so at siga alt útsýnið út á fjørðin og út á Oyndarfjørð.

Máli er eisini sent Hellunenvdini til Kunningar/Hoyringar. Hendan er ikki komin við nøkrum viðmerkingum.

Tá tað her er talan um bygging framvið landsvegi er málið eisini sent til viðgerðar hjá Landsverki.

Í skrivi dagf. 3 juli 2006 boðar Landsverk frá at teir einki hava ímóti at byggiloyvið verður givið.

Málið hevur verið fyri á fundi hjá Tekisku nevnd 23.11.06:

Tá tað í hesum føri er talan um uppíbygging til sethús sum frammanundan eru samanbygd, og ásetingarnar viðv. byggistigi eru í lagi, metir nevndin út frá eini heildarmeting, at tað í hesum føri kann góðtakast, at byggiloyvið verður givið sum eitt minni frávik til byggisamtyktina, og mælir nevndin býráðnum til at byggiloyvið verður givið sambært alternativ 2, soleiðis at.

1. Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríðum opi, sum er minst 50 cm í breeidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.

Veggurin móti matr. nr. 941 verður gjørdur sum eldsjóldarveggur (brandveggur) Tekningar hesum viðvíkjandi skulu góðtakast av teknisku deild, einki vindeygað skal verð í hesum veggi

1. Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.
2. Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá ústkrivingardegnum..

Rættaðar tekningar skulu latast kommununi til góðkenningar áðrenn byggiloyvið verður útskrivað.

***Avgerð:***

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 64/2006.</u>**

**Mál viðvíkjandi sethúsaútstykking í Fuglafirði.**

Tekniska nevndin heldur, at mest náttúrligt er, atb næsta útstykkingin verður gjørd frá verandi útstykking við Bakkageilina og norður á Kirkjurygg. Áhesum øki kunnu verðað útvegað umleið 33 grundstykkir, og er samlaða víddin á hesum øki umleið 32.000 fermetrar.

Verður einleikaprísurin kr. 55,00 fyri fermeturin, verður samlaði keypsprísurin umleið kr. 1.760.000,00.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. november 2006 og mælir býráðnum til, at tingingar verða tiknar upp við eigararnar beinanvegin, og at roynt verður at fáa hesar frá hondini innan 3 mánaðar.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 65/2006.</u>**

**Viðv. lýsan eftir byggifrøðingi/verkfrøðingi**

Tekniska nevnd hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum , dagfest 06. november 2006har hann heitir á nevndina um at viðgerða spurningin um at lýsa eftir einum verkfrøðingi/byggifrøðingi til teknisku deild kommununar skjótast gjørligt.

Àheitanin er grundað á, at tekniska deildin, sum er, hevur sera nógv at gera bæði við projekteringum og eftirlitum, og tí hevur seinastu 2 árini verið neyðugt at latið ávís tekniarbeiði og eftirlit út av húsinum, somuleiðis sum at hesi hava kosta kommununi nógvan pening.

Málið hevur verið viðgjørt á fundi 23.11.06

**Niðurstøða:**
- Jann Toftegaard er fyri at seta ein verkfrøðing/byggifrøðing afturat.
- Petur Abrahamsen er fyri við tí treyt at verkfrøðingurin/byggifrøðingurin arbeiðir undir núverandi býarverkfrøðingi og verður settur í samráð við býarverkfrøðingin.
  Jón N.Olsen mælir til, at tey arbeiðis sum tekniska deild ikki kemur út fyri at gera, verða í samráð við býarverkfrøðingin latin til ráðgevandi at taka sær av.

***Avgerð:***

Broytingaruppskot frá Signari à Brúnni um at beina málið aftur í teknisku nevnd fall. (2 atkv. fyri og 7 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Elisabeth D. Eldevig, Jón Nolsøe Olsen, Petur Abrahamsen, Dánjal vang og Jann Toftegaard).

Atkvøtt varð síðan um uppskotið frá Jón Nolsøe Olsen. Uppskotið fall. (2 atkv. vóru fyri, 6 atkv. ímóti og 1 atkv. var blonk. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Jann Toftegaard, Dánjal Vang, Elisabeth D. Eldevig, Eyðun á Lakjuni og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddi Signar á Brúnni).

Tilmælið frá Jann Toftegaard/Petur Abrahamsen varð samtykt við tí ískoyti, at lýsingin eisini umfatar arkitekt, eins og tann frá februar 2003. (6 atkv. fyri, 1 atkvøða ímóti og 1 atkvøða var blonk. Ímóti atkvøddi Petur Abrahamsen, meðan Jón Nolsøe Olsen atkvøddi blankt).

**Mál nr. 66/2006.**

***Viðvíkjandi broytingar í viðtøkunum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 31. oktober 2006 um viðm,erkingar til broytingar í viðtøkunum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF).

Á stýrisfundi tann 07. november 2006 tók stýrið einmælt undir við viðtøkubroytingunum, sum m.a. hava við sær, at kommunurnar ikki longur beinleiðis eru limir í KAF, men at tær framyvir verða limir umvegis avvarðandi kommunufelag, t.v.s. fyri okkara part KSF sum verður formligur limur.

Somuleiðis samtykti stýrið, at broyttu viðtøkurnar verða sendar Innlendismálaráðnum til góðkenningar, hetta sambært § 51 í kommunustýrislógini.

Umframt hesa broyting, so skulu interkommunalu felagsskapirnir SEV og IRF eisini kunnu gerast limir, og at felagið skal hava egnan aðalfund.

Í hesum sambandi verður mett rættast, at viðtøkubroytingarnar verða staðfestar av einstøku limakommununum.

Málið er viðgjørt á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2006, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við omanfyri nevndu viðtøkubroytingum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Avgerð:**

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 67/2006.**

## Viðvíkjandi uppskoti til leigusáttmála fyri kappróðrarneystið.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 23. november 2006 viðgjørt uppskot til leigusáttmála millum kommununa og Ítróttarfelag Fuglafjarðar – kappróðrarnevndina, sum fyrisiting kommununar hevur gjørt, hetta sambært fund millum stuðulsnevndina og mentamálanevndina á fundi tann 12. oktober 2006.

Nevndin mælir fíggjarnevndini/býráðnum til at góðtaka fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við teimum broytingum, sum havnanevndin hevur gjørt til uppskotið á fundi 20. november 2006, somuleiðis sum nevndin tekur undir við, at leigugjaldið verður ásett til kr. 20.000,00 árliga íroknað meirvirðisgjaldog at hetta verður mótroknað í árligum stuðli.

Mentamálanevndin hevur eisini viðgjørt § 3 í uppskotinm á fundi tann 20. november 2006 og mælir fíggjarnevndini/býráðnum til at góðtalka omanfyri nevndu leiguupphædd, og at kr. 20.000,00 (leiguupphæddin) verður játtað á hvørjum ári yvir konto 450010 "Mentamálanevndin stuðul) til Ítróttarfelagið (kappróðrarnevndina).

Sambært fyriliggjandi er hjálagda uppskot til leigusáttmála tillaga teimum broytingum, sum havnanevndin og mentamálanevndin hava framt á fundunum tann 20. november 2006.

***Avgerð:***

Tilmælini vórðu samtykt. (9-0).

**Mál nr. 68/2006.**

**Umsókn um keyp av økinum oman á kapppróðrarneystinum**

Umsókn innkomin vegna Firma Kato um at keypa økið omaná kapppróðrarneystinum á matr. nr. 239 af við Bakkaveg í Fuglafirði í sambad við ætlan um byggjan av nýggjum handilsbygningi

Málið hevur verið fyri á fundi hjá Telnisku nevnd 23.11.2006.

Mælt verður býráðnum til, at Fa. Kato fær loyvið at byggja omaná kapppróðrarneystið samb. ásettum treytum.

Jann Toftegaard var ikki við á fundinum tá umsóknin varð viðgjørd.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt varð Jann Toftegaard ikki á fundi vegna ógjegni.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Tórfríður Abrahamsen

Jón Nolsøe Olsen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen